Álit

í

løgtingsmáli nr. 114/2020: Uppskot til løgtingslóg um KT-heildarætlan fyri undirvísingarverkið

Landsstýrismaðurin í uttanríkis- og mentamálum, Jenis av Rana, hevur lagt málið fram 5. mars 2021, og eftir 1. viðgerð 10. mars 2021 er tað beint Fíggjarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 22., 23. og 25. mars og 8. og 13. apríl 2021.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við Lærarafelagið, Kommunufelagið, landsstýrismannin í fíggjarmálum, Jørgen Niclasen, og landsstýrismannin í uttanríkis- og mentamálum, Jenis av Rana, saman við Undirvísingarstýrinum.

Ein samd nevnd vísir á, at eftir uppskotinum verður landsstýrismanninum heimilað at fremja KT-heildarætlanina fyri undirvísingarverkið, og at útreiðslurnar til at fremja hesa í mesta lagi kunnu verða 40 mió. kr. Heildarætlanin er á fíggjarlógini fyri 2021 og við í løguætlanini næstu fýra árini.

KT-heildarætlanin í undirvísingarverkinum 2021-2024 fevnir um tvey høvuðsátøk, sum eru:

- at stovna "Skúlanet", sum er ein felags rakstrar- og tænastuveitingardepil, ið mennir og rekur eitt vælvirkandi og trygt KT-net fyri alt undirvísingarverkið, svarandi til tað, sum Landsnet er fyri landsstovnarnar.
- at menna eina framkomna og trygga lestrarfyrisitingarliga KT-skipan, sum er felags fyri fólkaskúlar, miðnáms- og yrkisskúlar, maritimar skúlar og Fróðskaparsetur Føroya.

Eingin av verandi KT-skipanum lýkur krøvini til KT-trygd og dátuvernd, og fleiri KT-skipanir krevja longu nú dagføringar, sum hvør sær eru kostnaðarmiklar.

Skúlaleiðslur, myndugleikar og politiska skipanin fáa ikki álítandi hagtøl, ið eru ein fyritreyt fyri umsiting, tilrættislegging og menning. Ónýttir møguleikar liggja í at samskipa KT-virksemið í undirvísingarverkinum, ið kunnu geva eitt munandi hægri tænastustig, stórrakstarfyrimunir og samvirkan, øllum undirvísingarverkinum til gagns.

Ein verkætlanarskipað strategisk KT-eind verður sett á stovn í Undirvísingarstýrinum, og fer hon at standa á odda fyri at samskipa, menna og seta í verk átøkini í hesi heildarætlan.

Nevndin vísir á, at avtalur eru gjørdar við KT-Landsins um Skúlanet og við Talgildu Føroyar um samstarv. Hetta samstarvið fer at spara tíð, orku og pening, og fer eisini at minka um váðar. Málið er, at Skúlanet og nýggja lestrarfyrisitingarliga KT-skipanin er sett í verk í øllum undirvísingarverkinum í 2025, og at rakstur, viðlíkahald og víðarimenning verður fíggjað innan verandi játtanarkarm.

Ein sannroynd er, at almennir stovnar saman við føroysku KT-vinnuni hava ment tryggar og vælvirkandi KT-skipanir fyri borgaran. Dømi eru Skattaskipanin, Búskaparskipan Landsins, Talgilda heilsuskipanin, Útgjaldskipanin í almannaverkinum, Talgildi Samleikin og Vangin, sum nú er settur í verk.

Nú er átrokandi tørvur á at seta sjóneykuna á undirvísingarverkið, sum hevur brúk fyri grundleggjandi endurnýggjan og umskipan av KT-virkseminum, sum fer at gagna samfelagnum og øllum, sum hava tilknýti til undirvísingarverkið. Nevndin er av tí greiðu fatan, at neyðugt er at fara til verka við hesi KT-heildarætlan sum skjótast.

Við hesum viðmerkingum tekur ein samd nevnd undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Fíggjarnevndin, 13. apríl 2021

Magnus Rasmussen formaður	Aksel V. Johannesen næstformaður	Jákup Mikkelsen
Bill Justinussen	Kristin Michelsen	Páll á Reynatúgvu
	Ruth Vang	